# Árni Olafsson 60

Flaggdagin fór Árni Olafsson, ráðgevi í danska uttanríkisráðnum, um tey seksti.

Árni Olafsson er útbúgvin búskaparfrøðingur, cand. polit., frá universitetinum í Keypmannahavn. Fjølbroyttur og dugnaligur sum hann er, flytir hann seg tó lætt og elegant innan øll samfelagsvísindalig fakøki. Seinastu árini hevur altjóða rættur, og serliga altjóða havrættur, verið partur av hansara dagliga arbeiði.

Fyrstu árini eftir at hava tikið prógv starvaðist Árni í danska fíggjarmálaráðnum. Yrkisleiðin kundi verið sum danskur karrieruembætismaður, tí honum stóð m.a. í boði at gerast sendifulltrúi í búskaparmálum á donsku sendistovuni í Washington. Hann valdi av privatum orsøkum ikki at taka av. Lívsstarvið gjørdist tíbetur fyri Føroyar og føroyska umsiting eitt annað. Tá Einar Kallsberg gjørdist skrivstovustjóri í Tinganesi, varð Árni Olafsson í 1976 settur í starv í uttanríkisráðnum sum serkønur í føroyskum viðurskiftum.

Síðani tá hevur hann átt høvuðsleiklutin í mongum samráðingum, ið hava tryggjað føroysk áhugamál. Nevnast kunnu m.a. samráðingar um framhaldandi fiskirættindi í fremmandum sjógvi eftir at fiskimarkini vórðu flutt út miðskeiðis í sjeytiárunum og samráðingar um handilsavtalur, m.a. við ES. Seinnu árini er innihaldið í starvinum sum serkønur í føroyskum viðurskiftum uttan iva broytt, men Árni umboðar framvegis uttanríkisráðið í føroyskum sendinevndum, ið samráðast um altjóða fiskiveiðiavtalur.

Tíðarskeiðið 1980 – 1984 hevði Árni farloyvi úr danska starvi sínum fyri at røkja uppgávuna sum skrivstovustjóri í Tinganesi. Eisini tá fekst hann einamest við altjóða fiskiveiðiavtalur. Í frágreiðingini um áttatiárini kann lesast, hvat Árni fekst við og hvørjar eygleiðingar hann gjørdi hesi árini. Hansara íkast til frágreiðingina um áttatiárini er sum altíð vælskrivað og korrekt, men avdúkar eisini, at tað býr ein spískur pennur undir diplomatisku kápuni.

Hóast Árni í 1985 fór aftur í starv sítt í uttanríkisráðnum, loysti hann manga uppgávuna fyri føroyskar myndugleikar. M.a. kunnu nevnast álitini, ið vórðu skrivað í sambandi við yvirtøkuna av ráevnunum, og eyðkendi pennurin hjá Árna man hava orðað flestu av uppritunum, sum skrivað vórðu til politisku tingingarnar í undirgrundarmálinum.

Í árunum frá 1993 til 2000 var Árni aftur í tænastu hjá landsstýrinum, hóast tænastustaðurin var í danska uttanríkisráðnum.



Hesi árini loysti Árni tvey stórmál fyri landsstýrið. Hann var formaður í oljuráðleggingarnevndini, ið hevur evnað til grundarlagið undir føroyskari oljuleiting, og hann leiddi vegna ríkið samráðingarnar við Bretland um landgrunsmarkið. Báðar uppgávurnar greiddi hann á fyrimyndarligan hátt. Í samráðingunum um landgrunsmarkið sýndi hann umframt sítt diplomatiska kynstur stórt uppfinnsemi, tá talan var um prógvgrundir, og lagt varð munandi afturat føroyskum landgrunsøki eftir at Árni tók yvir sum samráðingarleiðari.

Árni hevur ógvuliga víðan sjónarring, og hann dugir at lurta eftir teimum, ið hann samskiftir við – vísir ongantíð einum sjónarmiði frá sær uttan at hava hugsað um tað, greinað tað og gjørt sær eina sannførandi niðurstøðu. Hetta eru framúr eginleikar hjá einum diplomati, og sum samráðingarleiðari hevur Árni ikki bara góðar prógvgrundir fyri egnum sjónarmiðum, hann skilir eisini sjónarmiðini hjá mótpartinum, og evnar hann tískil altíð at meta um samráðingarstøðuna og ætla um næsta leikin. Árni kann pløga nakað djúpt viðhvørt, men ásannast má, at uttan hansara viðkomandi greiningar høvdu úrslitini oftast verið lakari.

Føroyskari oljuumsiting hevur Árni Olafsson verið góður í ráðum, og vit ynskja honum nógv góð ár.

**Herálvur Joensen**




†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Esmar Olsen**

andaðist á Ríkissjúkrahúsinum leygardagin 18. mai.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
fríggjadagin 24. mai kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Ebba,**

**Kári, Bjarni, Torbjørn, Hans Pauli og Marius**



# Brandur í donskum sjónvarpi



**Brandur Enni er nú aftur ovast á 15 teimum bestu, og um vikuskiftið framførdi hann hittið hjá sær í donskum sjónvarpi**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakkstein*

Brandur Enni tók um vikuskiftið ovasta sessin á 15 teimum bestu aftur frá amerikansku P.O.D.

Hetta er 6. vikan, at heitislagið »Waiting in the Moonlight« er á hitlistanum hjá Útvarpinum, og fyri aðru ferð nummar 1. Brandur hevur ligið millum fremstu sangirnar, síðani hann kom inn á listan.

Sunnumorgunin var Brandur Enni gestur í sendingini Snurre Snups Søndagsklub, sum verður send á danska TV2.

Væl kendi Bubber er vertur í sendingini, og hann prátaði við Brand. Ungi tvørámaðurin framførdi eisini sangin »Waiting in the Moonlight«, og framførslan riggaði væl.

Umframt prátið við Brand vísti Bubber eisini brot úr sjónbandalagnum hjá Brandi, og hann var serliga hugtikin av framúr vøkru landlagsmyndunum í sjónbandalagnum.

# Yvir 90.000 kr. til skúlanæmingar at ferðast fyri

NORRØNAFELAGIÐ
*Tíðindaskriv*

Fýra skúlaflokkar, sum fara at vitja javnaldrar í onkrum øðrum Norðurlandi, hava fingið tilsamans 93.000 kr. í stuðli frá Norðurlendska ráðharraráðnum. Norrøna Felagið í Føroyum umsitur stuðulin. Felagið fekk átta umsóknir í hesum umfarinum.

Næsta freist at søkja er sett til 1.november 2002. Høvuðstreytin fyri at fáa pengar er, at skúlaflokkurin er bæði gestur og vertur. Hann skal vitja ein skúlaflokk við javnaldrum í onkrum Norðurlandi, og tey skulu so koma til Føroya at búgva hjá næmingunum her. Umsóknir skulu sendast til Norrøna Felagið, J. Paturssonargøtu 24, 100 Tórshavn. Serlig umsóknarbløð verða ikki brúkt.

Flokkar í fólkaskúlanum og 1. og 2.g og 1.HF kunnu søkja.

Danska Foreningen Norden umsitur ein annan stuðul til skúlabarnaferðir, Nordplus Mini. Hann er fyri elstu flokkarnar í fólkaskúlanum. Føroyskir skúlaflokkar kunnu eisini søkja har.

Norrøna Felagið fær annars umsóknir um stuðul til mangt og hvat. Men felagið umsitur bara hendan eina studningin, tann til næmingaferðir. Umsóknir um stuðul til annað verða ikki viðgjørdar ella svaraðar.

## Birgir heldur fram

Nevndin í Norrøna Felagnum hevur skipað seg eftir aðalfundin. Birgir Kruse heldur fram sum formaður, og Heðin M. Klein heldur fram sum næstformaður.

Hini í nevndini eru Bárður Jákupsson, Hallstein Sigurðsson og Jorun Simonsen.

## Nordjobb ongan áhuga

Tíverri er áhugin fyri Nordjobb ikki so stórur í Føroyum. Men áhugin at koma til Føroya at vera nordjobbari, hann er stórur. 75 hava søkt, men í Føroyum eru bara tíggju pláss. Og tíggju fólk hava longu fingið arbeiði og innivist í summar. Kanska koma nøkur fá afturat.

Men Nordjobb er eisini fyri ungar føroyingar millum 18 og 26 ár. Og tað er spell, at føroyingar ikki brúka hendan møguleikan at arbeiða í einum øðrum landi í eitt stutt skifti. Tað er bæði spennandi og læruríkt, sigur Norrøna felagið.

Nordjobb hevur eina heimasíðu www.Nordjobb.net. Har eru allar upplýsingar og umsóknarblað.





FRIM Î RKER OG M Ï NTER S Ï GES !

Gratis vurdering i Thorshavn

**Fredag den 24.maj kl. 15-19, afholdes vurderingsdag p¬ Hotel F°royar, Thorshavn.**

Til vore kommende auktioner sßges gl. breve til og fra FÞrßerne, gl. postkort, fragtbreve og alle former for frimÞrkesamlinger samt mßnter, medaljer, pengesedler og ßvrige gamle betalingsmidler.



Medbring Deres samlinger til en gratis og uforpligtende vurdering.

Lßrdag den 25.maj vil der ligeledes vÞre mulighed for vurdering i Deres hjem efter forudg¬ende aftale. Kontakt os allerede nu for en uforpligtende samtale.

**THOMAS H Ï ILAND AUKTIONER A/S**
Frederiks Alle 116 Å DK-8000 Aarhus C.
Tlf. +45 8612 9350 / +45 4032 4711 / +45 2127 2198
www.thauctions.com Å e-mail: tr@thauctions.com